# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Javnaðarflokkurin velur yngra ættarliðið

Tá føroyskir flokkar skulu sett nýggj landsstýrisfólk eru vanliga mong fyrilit at taka. Ein flokkur kann lata ymisk atlit telja við í tilgongdini, eitt nú long og trúføst tænasta fyri flokkin, kynsbýti ella ein møgulig uppstilling til eitt komandi val. Spurningurin um avloysaran hjá Hans Paula Strøm hevur sett flokkin í trupla støðu. Lagna HP hevur skelkað flokkin, og vandin fyri maktstríði er mangan til staðar, tá persónsmál eru á dagskrá. Nógv hevur verið talað um, hvør, ið skal taka við eftir Jóannes, og tí var áhugin fyri júst sessinum hjá HP so stórur. Tað er í grundini løgið, at talan um formanskifti í Javnaðarflokkinum fyllir so nógv, tí Jóannes er enn í góðum árum og tykist vera væl fyri í allar mátar. Men tað skerst ikki burt, at flokkurin veksur ikki undir hansara leiðslu, og tað er júst slíkt, sum fær søgur um formanskifti at ganga.

Tað eru hartil tey, sum ikki halda seg aftur, og tað bøtir ikki júst um støðuna hjá formanninum. Nýggja valskipanin við einum felags valdømi hevur elvt til, at tinglimir og landsstýrisfólk kenna seg sum standandi í einum áhaldandi valstríði. Vit fáa tí javnt og samt sterkar markeringar frá teimum, sum eru framsøkin, og hetta ger tað heldur ikki lættari at vera formaður í flokki, sum er staddur í eini støðu, sum kann minna eitt sindur um kreppu.

Leiðsla Javnaðarfloksins er sjálvsagt greið yvir hesa støðu og kundi havt nýtt høvi til at styrkt flokkin, har tørvur er á endurnýggjan og øktari megi, nevniliga á tingi, har flokkurin burtursæð frá ávísum persónligum markeringum ikki er serstakliga sjónligur enn minni sterkur. Tað var júst hetta vit loyvdu okkum at filosofera um í gjár.

Men Javnaðarflokkurin valdi ta meira einføldu loysnina, og tað kann ein skilja, tí nógv talar hóast alt ímóti stórum broytingum í eini støðu, har tað brýtur í bæði borð. At valið fall á júst Aksel V. Johannesen er óvæntað og tí sera áhugavert, tí tað vísir, at Javnaðarflokkurin hóast alt dugir at líta frameftir. Aksel V. Johannesen hevur sera góðar fortreytir fyri at røkja eitt krevjandi starv sum heilsumálaráðið. Hann hevur góða og viðkomandi útbúgving og tilsvarandi vinnuroyndir, hann hevur, tað lítla vit hava sæð og hoyrt til hann, virkað tungusnjallur, dámligur og sakligur. Hóast sín unga aldur tykist hann hava politiskt pondus, og er helst ein, sum ikki lættliga verður tikin av fótum. Í ÚF í morgun, har hann fyri alt tað dugdi sera væl at svara fyri seg, talaði hann um at vera eyðmjúkur mótvegis sínum politiska starvi. Verður sæð burtur frá valstríði Obamas, nær hava vit so seinast hoyrt ein politikkara nýtt orðið eyðmjúkur? Hetta er í hvussu so er óvanligt málbrúk millum føroyskar politikkarar og gevur mynd av manni, ið tekur sína politisku ábyrgd í størsta álvara. Síðst men ikki minst tykist Aksel vera ideologiskt væl grundaður og er hetta nakað, sum flokkur hansara hevur stóran tørv á, tí mangan er torført at síggja munin á Javnaðarflokkinum og hinum flokkunum í politiska spektrinum. Vit ynskja nýggja heilsumálaráðharranum hjartaliga tillukku.

**Sosialurin**

## Menningin av sjúkrarøktini, eitt slag fyri bógvin

**VÁR Í GONG**



Síðst í juni fingu 24 sjúkrarøktarfrøðingar prógv sum bachelorar. Hesir høvdu tikið ískoytisútbúgvingina, sum uppgraderar sjúkrarøktarfrøðingar eftir eldru útbúgvingum til bachelorar.

Sjúkrarøktatfrøðisskúlin bjóðaði hesa útbúgving út í fjør. Sera stórur áhugi var fyri henni – yvir 100 søktu inn! Hetta ber boð um ein fakbólk, sum brennir fyri menning – nevnast kann, at í somu viku sum ískoytis bachelorarnir fingu prógv, fingu eisini 27 sjúkrarøktarfrøðingar prógv sum kliniskir vegleiðarar.

Ætlanin hevur altíð verið, at ískoytisútbúgvingin skal halda fram, til tørvurin á hesi útbúgving er nøktaður. Hetta hevur felagið fingið tilsøgn um frá fleiri landsstýrisfólkum, sum hava sitið í mentamálaráðnum. Vegna væntandi játtan hevur skúlin ikki havt møguleikan at bjóða ískoytisútbúgvingina út. Hetta kemur mongum dátt við. Sjúkrarøktarfrøðingar, sum hava nomið sær útbúgvingina eftir tí gomlu skipanini, hava eitt krav at fáa møguleikan at taka hesa útbúgving á hvørjum ári. Felagið hevur verið á fundi við mentamálaráðið um hesi viðurskifti, men tað hevur fingið at vita, hóast mótmælið, at pengar ikki eru í ár. Hetta er sera óheppið. Tað tykist okkum løgið at byrja eina útbúgving fyri at støðga eftir bert einum ári! Skúlin hevur nýtt nógva orku uppá hesa ískoytisútbúgving, og tey lesandi hava verið væl nøgd. Hesin steðgur kann verða ógvuliga kostnaðarmikil. Byrjað má verða av nýggjum, tá ískoytisútbúgvingin aftur fer av bakkastokki.

Felagið eftirlýsir eitt alment kjak um, hvat fyri visjónir eru fyri menning á útbúgvingarøkinum. Vælvitandi, at ein alheims fíggjarkreppa herjar í hesum døgum, sum eisini rørir okkara lítla samfelag, er okkara greiða meining, at rætta leiðin ikki er at spara á útbúgvingarøkinum.

Nógv kjak hevur tó verið um, hvussu vit kunnu fáa tey ungu at støðast í Føroyum – og hvussu útbúgvin fólk kunnu venda nøsina heimaftur. Men hesi signal, sum nú verða send út, fara ikki at hjálpa nakað uppá hesa støðu. Tað fara uttan iva fleiri sjúkrarøktarfrøðingar til t.d. Danmarkar at nema sær hesa útbúgving, og tað er als eingin trygd fyri, at hesi fólkini koma aftur.

Vónandi verður umraðfest á fíggjarlógini soleiðis, at ískoytisútbúgvingin kann halda fram. Í okkara grannalondum hevur hetta tilboð verið í fleiri ár, og haldi eg ikki, at tað sømir Føroyum at standa aftanfyri í so máta!

## Heldur brenna fyri enn brenna út

**BERGTÓRA H. JOENSEN**



Stak harmiligt, um møguleiki ikki er fyri ískoytisútbúgving hjá sjúkrarøktarfrøðingum í Føroyum. Í fjør søktu meir enn 100 – so áhugin er avbera stórur.

Øll kunnu brenna út, missa arbeiðsgleðina. Tó eru sjúkrarøktarfrøðingarnir ein fakbólkur, sum serliga er í vanda fyri at brenna út, um tey ikki av og á fáa nýggjan fakligan íblástur. Hetta er serliga galdandi fyri teir fakbólkar, sum í stóran mun nýta sjálvan seg í arbeiði sínum. Talan kann eisini vera um millum annað: námsfrøðingar, sosialráðgevar, lærarar, heilsuá – og atstøðingar.

Fakligt menning, virðing og tað at kenna seg 'ílatnan' til at loysa eina uppgávu er neyðugt, um fólk skulu varðveita arbeiðsgleðina – áhaldandi brenna fyri, heldur enn at brenna út í mun til arbeiðsøkið sítt. Tað eru júst eftir –og ískoytisútbúgvingar, sum eisini skapa fakliga menning, 'letur arbeiðsmegina í' og fær starvsfólk at varðveita arbeiðsgleðina.

**Umsorgan og besta røktin í vanda?**

Las herfyri eina analysu, sum vísti á, at heitar hendur fóru at resta í alla staðni í norðurlondum um heilt fá ár – fleiri eldri og færri arbeiðsførar hendur. Góðir eftirútbúgvingarmøguleikar er avgjørt eitt sum eggjar fólki at søkja eitt starv, umframt at eftirútbúgving á heilsuøkinum er neyðug, um vit skulu tryggja øllum bestu røktina.

Í Føroyum verða fólk innløgd oftari og longri enn í londunum, sum vit blivu samanborin við í Valconkanningini. So ikki minst her er brúk fyri heitu hondunum, um ætlanin er, at verandi mynstur skal halda áfram.

Talið á pensjónistum í Føroyum er um fá ártíggju tífaldað. Og heitu hondunum í umsorganarøkinum er serliga tørvur á jú eldri fólk gerast – tí jú eldri vit verða – størri tørv hava vit á hjálp frá umsorganarøkinum.

**Hvør skal rinda?**

Landið eigur avgjørt at eggja og kveikja uppundir ískoytis- og eftirútbúgvingar. Ja, útbúgvingarøkið sum heild. Men kanska tíðin eisini er búgvin, at størri krøv verða sett til arbeiðsgevarar um frí við løn til viðkomandi eftirútbúgving? Og kanska yrkisfeløgini eisini í størri mun enn í dag eiga at birta uppundir, at limir teirra støðugt eftiutbúgva seg? Veit væl at fleiri yrkisfeløg leggja stóra orku í júst hetta økið. Men kanska eitt áhugavert evni at viðgera eisini til sáttmálasamráðingar hjá enn fleiri - Haldi avgjørt, at vit her hava eina felagsábyrgd.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.